ENÁM 2026-27

Skúlasamstarv um 10. flokk







2026-27

Vit gleðast um, at heili 78 næmingar hava valt eNám komandi skúlaár.
Møguligt verður at velja ímillum 8 breytir – harav tvær nýggjar.
Vit síggja fram til eitt spennandi skúlaár.

Heimasíða: www.enam.fo
Teldupostur: enam@enam.fo

Góðu næmingar og foreldur/verjar

Tað gleðir okkum, at tit hava valt eNám komandi skúlaár.

Skúlasamstarvið um 10. flokk í Fuglafirði, á Strondum og við Streymin byrjaði í 2016 og seinastu 2 árini hava vit lagt okkum eftir at menna eNám til gagns fyri næmingar, skúlar og heim.

Hetta skúlaárið er næmingatalið met stórt og valdu vit tískil at vaksa um talið av breytum, so aftur er møguligt at velja íverksetan og heilsu- & røktarbreytina, sum ikki hava verið útbodnar í fleiri ár. Eisini hava vit raðfest tí skipaðu kunningina í sambandi við eNám, so tað gerst lættari at vera næmingur. Í tí sambandi hava vit gjørt innleiðsluritið, tú nú lesur og fingið nýggja heimasíðu, sum vit vilja eggja tykkum til at fara inn á, so tit eru væl fyrireikað til komandi skúlaár.

Børn mennast og búnast sera nógv um 16-17 ára aldur.

Í eNámi koma næmingar í nýggjar og ókendar støður. Teir ferðast út á tríggjar ymiskar skúlar og hava breytir, lærugreinar og/ella lærarar, tey ikki hava havt áður, knýta vinabond og læra næmingar at kenna kring alla Eysturoynna. Tey traðka fram, bjóða seg til og finna sítt plass av nýggjum í millum floksfelagar.

Eitt slíkt skúlatilboð krevur størri sjálvsábyrgd, sum eisini virkar eini persónligari menning at frama hjá teimum, sum við opnum sinni, áhuga og áræði velja at ganga í eNámi.

Talan er um eitt fjølbroytt og læruríkt skúlaár.

Blíðar heilsur



Berlys Toftegaard
Fuglafjarðar skúli



Hans Petur Jacobsen
Stranda skúli



Marjun I. Stauss
Skúlin við Streymin

Innihaldsyvirlit

Skúlaárið 2026-27 3
Tímatalvan 3
Breytir 3
Lærugreinar 3
Breytaskifti 3
Fyrsti skúladagur & samansjóðing 4
Busskort 4
Bussleiðir 4
Hent at vita 5
Heimasíðan 5
Vikuætlan 5
Boðklivi 5
Árskalendari 5
Fráboðan 5
Messenger / snarboð 6
Annað 6
Fráveru kunning 6
Royndir 6
Starvsvenjing 6
Verkætlan 6
Endaveitsla 6
Prógvhandan 6

Skúlaárið 2026-27

Tímatalvan

Næmingar skulu hava minst 28 tímar um vikuna (undantikið næmingar, sum frammanundan hava gingið í skúla við tillagingum og við serligum skipanum).

Breytir

Allar breytir telja 6 tímar, undantikið sangleikur, sum telur 12 tímar.

Komandi skúlaár verða fylgjandi breytir:

GG. Stytting fyri staðseting stendur í parantes

Mánadagur	Mikudagur	Fríggjadagur
Heilsu og røktarbreyt (FFS)	Køksbreyt (allir)	Sangleikur (FFS)
Ítróttabreyt (FFS)	Íverksetan (SVS)	eGaming (SVS)
Sjóvinna (SVS)	Handverksbreyt (STR)	

Lærugreinar

Lærugreinarnar verða lisnar í heimaskúlanum týsdagar og hósdagar. Útboðið er fylgjandi:

SVS	FFS	STR
FØ (6 tímar)	Mál (6 tímar)	Mál (7 tímar)
ST (4 tímar)	ST (4 tímar)	ST (4 tímar)
		Køk (2 tímar)

Breytaskifti

Fyrstu 3 vikurnar sleppa næmingar ikki at skifta breyt. Teir møta til breytirnar, ið upplýstar vóru, tá meldað varð til eNám. Hóast næmingur ynskir breytaskifti, er umráðandi at møta, tí møgulig frávera verður tald við í samlaðu skrásetingina.

Ynskir næmingur at skifta breyt ella lærugrein, verður fráboðan send skúlanum umvegis heimasíðuna. Tá skúlin hevur góðkent og svarað, er skiftið galdandi. Um breytin er fullteknað, verður ynskið noktað.

Hvussu og nær?

- Send ynski umvegis fráboðan á heimasíðuni
- Møguleiki er at skifta í viku 37-38
- Frá 21. september eru valini bindandi

Fyrsti skúladagur & samansjóðing

- Mik. 12. august verður møtt í heimaskúlanum
- Mán. 17. august er samansjóðingardagur í Skúlanum við Streymin

Kunnað verður um bussarnar á heimasíðuni.

Busskort

Um næmingar ikki frammanundan hava virðis- ella busskort, verður tað útflýggjað fyrsta skúladag.

Um kortini ikki eru klár ella virkin við skúlaársbyrjan mugu næmingar gjalda fyri bussin. Minnist til at goyma kvittanirnar, so tit kunnu fáa peningin endurgoldnan frá skúlanum.

Er ongin peningur/einki klipp á kortinum, skal næmingurin seta seg í samband við skrivara ella leiðslu.

Bussleiðir

Bussleiðir, næmingar brúka í sambandi við eNám, eru at finna á heimasíðuni undir *bussleiðir*.

Talan er um ruturnar:

- 200 Oyrarbakki – Eiði – Oyrarbakki
- 223 Hósvík – Kambsdalur
- 400 Tórshavn – Klaksvík – Tórshavn
- 410 Fuglafjørður – Gøtudalur
- 440 Skálafjarðarleiðin
- 444 Strendur – Kambsdalur



GG.

Til ber at tekna seg til SMS-skipanina hjá SSL og harvið fáa boð um rutu fyrst á morgni í fall avlýsingar eru. Tað er serliga hent á vetri.



Melda til

Ynskja tygum at fáa boð um broytingar á t.d. leið 700, send hesi boðini til 740 740:

SSL 700

Melda frá

Ynskja tygum ikki longur at fáa boð um broytingar á t.d. leið 700, send hesi boðini til 740 740:

SSL 700 FRA

Hent at vita

Heimasíðan

Samstarv millum tríggjar skúlar setir eyðvitað størri krøv til samskifti og kunning og tískil hava vit lagt okkum eftir at skipa heimasíðuna, so næmingar og foreldur/verjar finna *alla* neyðuga kunning á ella umvegis heimasíðuna www.enam.fo.

Vikuætlan

Undir *vikuætlan* er leinki til ávísu breytirnar og heimaskúlarnar.

MYND

Hugsanin er, at næmingurin altíð fer inn á enam.fo og ikki skal fyrihalda seg til tvær heimasíður, tí leinkið til heimaskúlan beinir næmingin á rætt stað – eisini tá kunning frá heimaskúlanum verður løgd út á heimasíðu skúlans.

Á skúlans heimasíðu verður m.a. kunnað um fyrsta skúladag, verkætlan, jólavikuna, kirkjugongd, starvslærur v.m.

www.enam.fo er tískil høvuðssíðan, tit skulu halda tykkum til komandi skúlaár.

Væntað verður, at næmingur møtir fyrireikaður og kunnar seg á síðuni undan hvørjum skúladegi.

Boðklivi

Á vikuætlanini eru stutt boð. Longri boð verða løgd á boðklivan.

Árskalendari

Árskalendarin liggur á heimasíðuni undir *kunning*.

Fráboðan

Er næmingur sjúkur ella ikki fær møtt, verður boðað frá umvegis heimasíðu skúlans ella eftir avtalu við breytalærararnar.

Messenger / snarboð

Fleiri av breytunum hava Messenger bólk, tó skal øll viðkomandi kunning eisini verða løgd á vikuætlanina.

Annað

Starvslæra, verkætlan og royndir liggja samstundis á øllum skúlunum. Sí árskalendaran undir kunning.

Fráveru kunning

Fráveran verður eftirhugd áðrenn heystferiuna og jólaferiuna.

Er fráveran omanfyri 12 %, verða foreldur/verji kunnað. Sæst eingin bati, verður kallað inn at umrøða skúlagongdina.

Royndir

Royndirnar eru í heimaskúlanum og nærri kunning verður løgd á vikuætlanina í lærugreinini.

Sí árskalendaran á heimasíðuni.

Starvsvenjing

Vika 40 – 41 (byrjar 28. september).

Verkætlan

Ongar breytir eru í desembur – tá er verkætlan. Sí nærri kunning á vikuætlanini.

Endaveitsla

?

Prógvhandan

Prógvhandan er á heimaskúlanum fyri tey, sum hava lokið skúlagongdina og møtt til ásettar royndir.

Eru ivamál ella viðmerkingar, eru tit vælkomin at skriva til enam@enam.fo ella venda tykkum til skúlastjórararnar.

Við vón um eitt gott og gevandi skúlaár.

Leiðslunnar vegna

Berlys Toftegaard, skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla

Samskipari 2026-27